

# Tingfólkið sang jólini inn

Áðrenn tingið fór til hús reististi tingfólkið og sang Gleðilig Jól,. Hetta var ein vakur háttur at enda ein dag, har kjakið um fíggjarlóg og kanska mest um fíggjarligt óskil á Læraraskúlanum hevði verið hart.

Tað ljóðaði fagurt, og flest øll dugdu øll orðini. Tað bar til hjá bæði samgongu og andstøðu at syngja sama lag –í øllum førum hesa løtuna

Fíggjarlógin er samtykt, og tinglimirnir eru farnir til hús at pynta jólatrø, pakka gávur inn og annars at fyrireika seg til jóla.

Tingfundur verður aftur 31. januar, so talan verður um ein langa og góða jólafrítíð.

**nud**

# Útseldar havfrýr

Allar 3 konsertirnar við teimum 3 havfrúnnum Lenu, Guðrun og Eivør eru útseldar, skrivar heimasíðan hjá Lenu, www.lenamusic.com. Konsertirnar verða í Norðurlandahúsinum 28. og 29. januar.

Hesar konsertir eru ein endurtøka av væleydnaðu konsertini við teimum trimum í Keypmannahavn í summar. Tað er blaðið Kvinna, ið skipar fyri konsertunum. Allar 3 songkvinnur kundu ivaleyst fylt Norðurlandahúsið, so tað er ivaleyst passandi, at tær fylla húsini 3 ferðir.

**nud**



*3 av bestu føroysku songkvinnunum fara á pallin í Norðurlandahúsinum 3 ferðir*

# Christian Fróði við yrkingum

**Eftir at hava skrivað hópatals yrkingar í føroysku bløðunum roynir Christian Fróði Djurhuus seg nú við egnari útgávu**

YRKINGARSAVN

Betwixed eitur yrkingarsavnið, sum Christian Fróði Ólason Djurhuus nú hevur givið út. Yrkingarnar í savninum eru einar fjøruti í tali, og eru hesar ein blanding av reinum sálarligum upplivingum og so nakrar romatiskar yrkingar, sum hann flest allar hevur skrivað á ungum árum.

Um savnið kann sigast, talan sum so ikki er um nakran málrættaðan boðskap, men at tað heldur ber brá av blandaðum kenslum.

Heitið "Betwixed" samsvarar við yrkingarsavnið. Og tað setur síni spor í sandin, har slóðað verður inn á ungdóm og aldurdóm, vár og heyst, summar og vetur.

Kápan er svørt og hvít, við mynd, ið Karin Maria Djurhuus, systir Christian Fróða, hevur málað.

Yrkingarsavnið er útgivið við egnum forlag, og fæst í bókabúðunum. "Betwixed" er 32 blaðsíður til støddar og kostar 70 krónur. Yvirskotið av "Betwixed" fer óskert til felagið "Sinnisbata"




Bjargingarútger til skip og bátar
• Neyðrakettir og hondblúss
• Bjargingarvestar og kransar
• Flótidraktir
• Pioneer plastbátar –nógv model!
Vit útvega alt bjargingarútgerð uppá fyrispurning
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Atlas Copco
boriútgerð & borstál:
· Grótborar
· Meitlar/kílar
· Borimaskinur
· Brekkarar
· Luftslangur
· Smyrjitól
· Vatnútskiljarar
· Kompressarar
Til sølu & leigu
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

HONDA
Streymgeneratorar

HONDA
• Streymgeneratorar
• Vatnpumpur
• Grund/Dykkpumpur
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

BT-LYFTIVOGNAR
eru á goymslu
Føroya mest seldi lyftivognur vegna góðsku
Eykalutir og tænasta

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Oljuovnar
Til bátin, summarhúsið og aðrastaðni


Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Sløkki- og neyðútgerð
• Brandslangur
• Slanguvognar
• Eldsløkkjarar
• Brandteppir
• Forbindsskáp
• Børur
Vit útvega flest alla útgerð innan sløkki- og neyðútgerð.
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00